## Høgni Lisberg um Angeliku:

- Eg haldi at tað er ordiliga frískt, at Angelika sum klassiskur tónleikari flytur seg yvir í rútmiskan populer tónleik. Hetta er onkursvegna ein uppgerð við klassiska skúlan. At hon so eisini ger tað ordiliga væl er uppaftur betri. Tað riggaði væl hjá okkum at spæla saman við henni.



*Høgni Lisberg hevur spælt saman Angeliku til dans á Skarv í tí, sum best kann lýsast sum ein superbólkur. mynd: ESJ*

# sigast av mannamunni



*Angelika verður við bólkinum Kvonn at síggja á svenska Umeåfestivalinum í vár og er ætlanin eisini at gera eina konsertferð ígjøgnum Avstralia og Japan. Í Yggdrasilleguni fer okkurt nokk eisini at henda í konserthøpi, millum annað spælir Yggdrasil saman við Rasmus Lyberth hetta vikuskiftið*

mangar í tali, og nú er hon í Keypmannahavn.

- Eg havi tvey og eitt hálvt ár eftir her í Keypmannahavn, men annars taki eg ein dag ísenn, fortelur hon róliga.

### Avmarkingar

Angelika er ein ung og eisini sera virkin genta. Sum 23 ára gomul má sigast, at hennara luttøka í føroyskum tónleiki er sera fjølbroyttur, bæði í bólka- og konserthøpi. Tó eru hennara hjartabørn enn klassiskur- og fólka ónleikur.

- Eg eri opin fyri tí mesta, tó haldi eg ikki, at eg hevði farið út í tungmálmstónleikin at brúkt míni evnir, flennir hon, meðan hon leggur aftrat, at stílurin hjá tungmálmsviolintulkaranum Vannesa Mae heldur ikki er nakað henni dámar.

### At ferðast

Við sínum herviliga ágrýtni, kann ein ikki undrast á hví hon kemur so nógv út til onnur lond at spæla, men tað við ferðingini kann vera hart fyri kroppin.

- Mær dámar væl at ferðast. Sjálvandi blívur ein troyttur inn ímillum, men tað at eg kann spæla fyri áhoyrarum og møta øðrum fólkum frá mínum yrki, sum hava somu hugsanir sum eg, er eitt heilt serligt upplivilsi og ger tað alt vert, greiðir Angelika frá.

### Angelika anno 2007

Ikki er heilt víst, hvat fer at henda hjá evnaríka tónleikaranum í 2007, men nógv hugskot eru í luftini. - Eg havi ein dreym um at geva eina fløgu út við Kvonn um ikki so langa tíð, so tað verður spennandi at vita, hvat spyrst burturúr, sigur hon.

Millum annað verður Kvonn at síggja á svenska Umå festivalinum í vár, og er ætlanin eisini at gera eina konsertferð ígjøgnum Avstralia og Japan. Í Yggdrasilleguni fer okkurt nokk eisini at henda í konserthøpi, millum annað spælir Yggdrasil saman við Rasmus Lyberth hetta vikuskiftið, fyrst á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn leygardagin og sunnudagin í Norðurlandahúsinum.

Hvør veit, kanska verður Angelika Nielsen at síggja á pallinum til ein av føroysku festivalunum í summar.